# Stýrisfundarbók FKF

## 14-01-2011 / 1

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 13:30

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Erik Davidsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | ikki møttur |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

---

**Fundarmál nr: 1**

FKF Jour. nr: 09-111

Reist av: skrivstovuni

Fundarmál: 43. umboðsráðsfundurin 2011, tema

Málslýsing: Í samband við fyrireikingina verður skotið upp, at FKF bjóðar limunum - ella øllum kommununum - at luttaka í tiltaki eina ferð seinri í ár, har eitt ella fleiri evni verða sett í hásæti. Hvør luttakari sær kann skipa seg á sín hátt innan fyri evnið. Sí skjal 1, presentation.

Fundarsamtykt: Víst verður á, at tað verða hildnir opnir fundir í kommununum á ymsum økjum, td. Foreldraráðið, sum hevur fyrilestrar. Víst verður á skúlaøkið, sum er eitt heitt evni í løtuni.

Fyrireika kjak um evnið.

*Støða: Í gongd.*

---

**Fundarmál nr: 2**

FKF Jour. nr: 09-107

Reist av: Fiskimálaráðnum

Fundarmál: Tilbúgvingarlóg

Málslýsing: Seinasta heyst var uppskot um nýggja tilbúgvingarlóg sent til hoyringar. Móttøkan av uppskotinum var kaldlig. Fiskimálaráðið hevur tí valt at senda uppskotið út av nýggjum har viðmerkingarnar frá hoyringspørtunum eru tiknar við. Sí skjal 2.

Bergmann hevur verið á fundi í desember í Fiskimálaráðnum, saman við KSF og IMR, har viðmerkingarnar frá hesum stovnum til uppskotið vóru umrøddar.

Sæð frá kommunurnar sjónarhorni eru broytingarnar í nýggja uppskotinum hesar:

§ 8. Í samband við at lsm kann áseta reglur um innhald og støðd á kommunalari tilbúgving, er hettar broytt, so hetter skal gerast í samráð við kommununa.

§ 10. Krav verður sett til kommunurnar, at skulu taka ímóti, hýsa og kostarhalda bráfluttum.

Stk. 2. Felags kommunal tilbúgving skal haldast innanfyri tey 7 økini ásett í kunngerðini um kommunal samstørv.

§ 11. Kommunur hava skyldu, at veita hjálp til aðra kommunu í vanlukkustøðu, tó ikki um tørvur er á manning og amboðum samstundis aðrastaðni.

§ 12. Landi skal veita kommununum hjálp um stødd ella slag av vanlukku krevur innsats á stigi 3. Tvs. at landið skal hava eina tilbúgving, amboð, til stórar vanlukkur.

§ 13. Samansetingin av kommunalu tilbúgvingarnevndini er broytt, so borgarstjórin er formaður og kommunan annars altíð hevur meirilutan í nevndini.

Stk. 4. Kommunur, sum hava felags tilbúgving, skulu eisini hava felags tilbúgvingarnevnd.

§ 14. Um tilbúgvingarætlanir. Kommunan skal við støði í eini váðameting, gera eina tilbúgvingarætlan fyri kommununa. Tvs. at kommunala tilbúgvingin nýtist ikki verða meira víttfevnd enn brúk er fyri. Er samstarv, kunnu kommunur "býta" amboðini ímillum seg at basa á stigi 2 og 3. Tilbúgvingar- og brunaumsjón landsins skal góðkenna ætlanirnar.

§ 17. Um samstarv. Landstýrismenn og kommunur gera sínamillum avtalu um skipan av tilbúgving. Hvær skal gera hvat og hvør skal liggja inni við amboðum. Partarnir hava skyldu at samstarva.

§ 22. Kommunali átaksleiðarin hevur ræði á skaðastaðnum.

Hoyringsfreist er til 28/1.

Tilmæli:
Uppskotið gevur kommununum møguleika, at ávirka býtið ímillum kommunala- og landstilbúgving í mun til, hvør skal liggja inni við t.d. amboðum til størri oljudálkingar, tvs. átøk á 3. stigi.

Krøvini til kommunalu einkultu kommunlu tilbúgvingini skulu ásetast í samráð ímillum land og kommunu, tvs. at lsm ikki bara soleiðis kann áseta hesi krøv.

Fundarsamtykt: Tilmælini samtykt við eyka viðmerkingum til §8 um, at útlenskar útbúgvingar verða góðkendar ájavnt við útbúgvingar her í landi.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-107_1.4 til Fiskimálaráðið 31.januar.*

**Fundarmál nr: 3**

FKF Jour. nr: 09-130

Reist av: Sjálvstýrisflokkinum

Fundarmál: Broytingar viðv. fólka- og miðnámsskúlum

Málslýsing: Sjálvstýrisflokkurin hevur sent felagnum 3 uppskot til hoyringar. Sí skjal nr 3.

1. Uppskot til broyting í fólkaskúlalógini,

við ásetingum um at foreldrini avgera um teirra 6 ára gamla barn skal í skúla 1 ár áðrenn vanligt og

broyting í samansetingini í skúlastýrinum har øll foreldur, og ikki bert tey sum hava foreldramyndugleika, eru valbær.

2. Uppskot til samtyktar at endurskoða fólkaskúlalógina, har m.a. Er ásett at fólkaskúlin verður fluttur til kommunurnar at umsita.

3. Uppskot til samtyktar um lestrarpláss.

Fundarsamtykt: Ongar viðmerkingar.

*Støða: Avgreitt.*

---

**Fundarmál nr: 4**

FKF Jour. nr: 09-125

Reist av: Mentamálaráðnum

Fundarmál: Námsfrøðilig stevnumið, dagstovnaøkið

Málslýsing: Í framhaldi av seinasta fundi, eru nakrar upplýsningar fingnar til vega. Sí skjal 4 og 4a.

Fundarsamtykt: Svarskrivið frá bólkinum góðkent.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-125_1.3 til MMR 1. februar.*

---

**Fundarmál nr: 5**

FKF Jour. nr: 09-095

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Jarðhiti, lógaruppskot

Málslýsing: VMR hevur sent uppskot til løgtingslóg um jarðhita til hoyringar. Hoyringsfreistin sett til 2. februar 2011. Sí skjal nr. 5.

Uppskotið í stuttum upp til, at loyvi at seta upp jarðhitaskipan skal fáast til vega frá landsstýrismanninum og at kommunurnar skulu hoyrast í málinum.

Annars setur lógin krøv til installatión, installatøri, rakstri og burturtøku av útgerðini.

VMR, saman við Jarfeingi, tók málið upp í 2010. Málið var fyri á stýrisfundi í juni 2010 og vóru umboð fyri VMR og Jarðfeingi á stýrisfundinum í august 2008 og greiddu frá.

Áskoðan felagsins á fundinum juni 2010 var, at kommunurnar kunnu gera reglugerð fyri økið og síðan brúka Jarðfengi sum ráðgeva.

Fundarsamtykt: Hví skal kommunan ikki hoyrast, tá talan er um vatnrættar boringar (§5)?

Kommunan er byggimyndugleiki. Hettar er bygging, tí eigur loyvi at fáast frá kommununi. Kommunan kann fáa neyðuga ráðgeving til vega frá Jarðfeingi ella øðrum privatum veitara. Kostnaður fyri hettar kann leggjast á gjaldið fyri loyvi.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-095_1.6, til Jarðfengi 2. februar.*